

*Savnsmynd*

# Hundrað gloymd brekað børn

**Við tað at eingin sáttmáli er gjørdur millum Heilsutrygd og Ergoterapifelagið, fáa børn, sum bera brek ella hava varðandi sjúku, onga ergoterapi. Ergoterapeutfelagið harmast, at Heilsumálaráðið ikki hevur betri stundir at samráðast**

Randi Jacobsen

Brekað børn og børn við varandi sjúku í Føroyum fáa langt burtur frá ta hjálp, sum tey hava fyri neyðini.

Tey eru snøgt sagt slept upp á fjall.

Børnini mugu sleppa til bæði fysioterapi og ergoterapi fyri at halda vøddarnar við líka. Fysioterapi hjálpir upp á stóru vøddarnar, og ergoterapiin hjálpir upp á fínmotorikkin.

Men seinastu mánaðirnar hevur ikki borið til hjá teimum umleið 100 likamliga børnunum við breki ella varandi sjúku at sloppið til ergoterapi.

Orsøkin er tann einfalda, at eingin sáttmáli er millum Heilsutrygd og Ergoterapifelagið, og tað dregur út at fáa gjørt nýggjan sáttmála.

### Torført at gera sáttmála

Hanna á Reynatúgvu, forkvinna í Ergoterapeutfelagnum harmast, tí hon veit, hvussu ringaru støðu børnini eru í. Samstundis er hon bilsin um, at ikki fleiri royna at streingja á fyri at fáa sáttmálan gjørdan. Tað er hennara fatan, at Heilsumálaráðið, sum er samráðingarpartur, ikki hevur nóg nógva ella ikki brúkar nóg nógva orku til hesar samráðingar.

Katrin Gaard, fulltrúi í Heilsumálaráðnum sigur, at ráðið hevur sent felagnum fundarboð.

Hon sigur annars, at tað er trupult at gera sáttmálan. Ikki ber til bara at umseta ein danska sáttmála, tí her eru ergoterapurtarnir, sum sáttmálin fevnir um, privatir og ikki almennir, sum teir eru aðrastaðni.

### Broytt kunngerð

Áður var eingin trupulleiki hjá foreldrum at børnum við breki ella varandi sjúku at fáa ergoterapi til børnini. Tað kravdi bara eina ávísing frá kommunulæknunum, og rokningin varð send Almannastovuni.

Men so varð kunngerðin hjá Almannastovuni broytt soleiðis, at treytin fyri at veita stuðulin er sáttmáli við Ergoterapeutfelagið.

Ergoterapeutar hava hóast sáttmálaloysi í nøkrum førum átikið sær at geva børnum ergoterapi og bíða við at senda rokningina.

Heilsumálaráðið sigur, at tá ið sáttmálin er komin í hús, verða rokningarnar rindaðar.

Men eftir standa fleiri børn við limsbreki ella varandi sjúku og fáa ikki ta ergoterapi, sum tey hava fyri neyðini.

# Gerhard vendir sær til baklandið

**Gerhard Lognberg, løgtingsmaður Javnaðarflokins vil hava at vita frá lokalfelagnum í Sandoynni, um hann førir rættan javnaðarpolitikk ella ei**

Randi Jacobsen

Tvístøðan millum Gerhard Lognberg og hini almennu umboðini í Javnaðarflokkinum er ikki loyst enn, síðan tingbólkurin og landsstýrisfólk floksins fríggjadagin alment eftirlýstu Gerhardi Lognberg og bóðu hann koma til arbeiðis í flokkinum.

– Nei, eg havi hvørki hoyrt nakað frá John Johannesen ella Jóannesi Eidesgaard, men Helena Dam á Neystabø ringdi tað kvøldið og boðaði frá, at hon ikki stóð aftan fyri brævið, sigur Gerhard Lognberg.

Sjálvur heldur hann seg føra javnaðarpolitikk við ikki at góðtaka, at eldraøkið og skúlaøkið verða løgd út til kommununar at umsita. Gerhard lognberg endurgevur formanninn í lærarafelagnum, sum hevur sagt, at tað bjargarikki skúlaverkinum at lata smáar skúlar aftur.

Ótolandi viðurskiftini í flokkinum fingu Gerhard Lognberg at venda sær til Sandoyar Javnaðarfelag og biðað um fund. – Fundurin verður í kvøld. Eg havi onga hóming av, hvør niðurstøðan verður, um eg fari frá ella hvat, sigur Gerhard Lognberg.

### Fult starv í tinginum

Fríggjadagin varð Gerhard Lognberg endurgivin fyri at siga, at løgtingsarbeiðið var hálvt, og borgarstjórastarvið hálvt.

– Eg má viðganga, at eg havi verið mismæltur. Borgarstjórastarvið er hálvt, men tingarbeiðið er fuylt starv, og tað fái eg eisini fulla løn fyri.

Hergeri Nielsen, tingformaður sigur, at tað er einki sum eitur at arbeiða hálva tíð i tinginum.



*Gerhard Lognberg leitar sær nú stuðul í sínum egna valdømi*